# Øðrvísi og hugnaligari luktur í bakarínum

**Bakaríið í Saltangará er stór fyritøka, og eisini har eru tey í jólahýri, og jólini merkja baksturin. Men eisini fáast í Bakarínum t.d. køkur til serstøk høvi, t.d. brúðarkøkur. Nú er jólasølan byrjað við kleynum, siropkøkum og jólabollum, sigur Sofus Hansen**



Tað eru 6 ár síðani, at Sofus Hansen yvirtók Bakaríið í Saltangará, men Bakaríið er eldri enn tað.

Bakaríið í Saltangará hevur havt Eysturoynna og part av Streymoynni sum kundar, men hetta er eitt sindur ójavnt og gongur eitt sindur aftur og fram.

- So er, og kappingin á hesum økinum er hørð, sigur Sofus Hansen.

Bakaríið er í Saltangará, og handil er eisini partur av Bakarínum, og so verður bakstur eisini koyrdur út á ymsu sølustøðini.

## Breitt úrval

- Vit hava breitt úrval og sera góð breyð. Og so hava vit eisini stórt og gott útval av køkum. Vit hava eisini køkurnar til serstøk høvi, t.d. lagkøkur og brúðarkøkur, sigur Sofus Hansen.

## Jólaligt

Nú jólini nærkast, so merkist hetta eisiní Bakarínum í Saltangará.

- Nú er jólasølan byrjað við kleynum, siropkøkum og jólabollum. Ein kann siga, at talan er um øðrvísi og hugnaligari lukt í bakarínum, enn vanligt er, sigur Sofus Hansen.

Bakaríið í Saltangará er rættiliga stór fyritøka, og eini 16, 17 fólk eru í starvi fulla tíð.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*











